filmar

# Ein trøllakambur

## - Shrek fyri triðju ferð

### Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com



Triði Shrek filmurin er meiri ella minni óneyðugur, hann hevur til endamáls at vinna pening og einki annað.

Hesuferð eru Shrek og Fiona við at finna seg til rættis sum hjún. Spurningurin er, um Shrek er til reiðar at fáa børn eisini. Longu her vísir tað seg, at ævintýrið um trøllið Shrek og prinsessuna Fionu fyri langari tíð síðan er komið at enda. Hvør tímir at hoyra um, hvat hendi aftaná "tey livdu lukkuliga alla tíð", kanska ikki so nógv.

Hesuferð er tað Shrek og Fiona sum skulu velja um tey vilja arva krónuna, tí gamli kongurin er við at doyggja.

Aftur nú koma eitt asna og ein ketta í stúvlum honum til hjálpar, ella tey gera eisini nógv fortreð.

Ein annar arvingi til trónuna er Prins Artie, men eisini hin óndi Prins Charming, ið vil verða kongur.

Shrek fer at leita eftir Artie, tí hann vil ikki vera kongur, men skipið renur á land. Seinni møta tey gandakallinum Merlin, sum kann hjálpa teimum, men hann er heldur løgin.

Eg var farin at hyggja eftir hesum filminum við einum barni, men filmurin var ikki komin í helvt, fyrr enn barnið vildi sleppa undan at hyggja meiri.

Sjálvur sat eg gjøgnum filmin, men sum hann var keðiligur og óneyðugur allur, sum hann er. Hann byrjar keðiligt og er keðiligur allan vegin igjøgnum.

★☆☆☆☆☆

**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| **Shrek** | **Mike Myers (Amin Jensen)** |
| **Esil** | **Eddie Murphy (Jan Gintberg)** |
| **Prinsessa Fiona** | **Cameron Diaz (Mille Hoffmeyer Lehfeldt)** |
| **Den Bestøvlede Kat** | **Antonio Banderas (Kristian Boland)** |
| **Dronningin** | **Julie Andrews (Kirsten Lehfeldt)** |
| **Kongen** | **John Cleese (Stig Hoffmeyer)** |

**Longd 93 minuttir.**
**Frumframførdur í Havnar Bio 31. august 2007.**

DVD DVD DVD DVD DVD




**300** er ein av teimum heilt stóru filmunum í 2007. Hann er um slagið við Thermopylæ, har kong Leonidas og hansara 300 djørvu spartanarar komu at vinna á Kong Xeres, ið hevði størsta herin í heiminum. Spartanarar vilja ikki yvirgeva seg, men berjast til deyðan. Hetta er filmatiseringin av teknirøðini hjá Frank Miller, hann sum gjørdi Sin City, hesin filmurin er minst líka góður.

★★★★★☆

**Number 23**, er um Walter Sparrow. Hann er sera upptikin av gátuni um talið 23. Hann finnir inn í eina heila mentan, har talið 23 er ein umráðandi partur av øllum. 23 er tó ein hamrandi elendigur filmur, ið ikki hjálpir DVD-útgávuni.



★☆☆☆☆☆

**Epic Movie** er ein mockumentary, í traditiónini frá Airplane (1980), Hot Shots (1991) og til Scary Movie (2000). Her fáa filmar sum Narnia, Pirates of the Caribbean, X-Men, Da Vinci Mysteriet, Superman, Charlie og Chokoladefabrikken og Nacho Libre av at vita. Hetta er reinur lortur.




★☆☆☆☆☆

**Dharma & Greg sæson 2** er enn ein sesong av røðini um tað ólíka paralagið. Serliga er tað Dharma, sum er hin vældámdi figururin í hesi røðini. Ein super skemtilig røð. Sæson 2, er líka góð sum hin fyrra.




★★★★★☆